# Merkisdagur í Runavíkar kommunu

**Týsdagurin var ein ávísur merkisdagur í Runavíkar kommunu. Í fyrsta lagi var samkoma í nýggja bygninginum, sum kommunan hevur latið byggja omanfyri grótbrotið á Lambareiði. Tá ið hendan løtan var umliðin, varð farið oman í gamla bygdaskúlan í Lamba, sum nú er umvældur og útbygdur við einum tilbygningi**



*Býráðslimir í Runavíkar kommunu saman við umboði fyri Skála komunu, f.v.: Regin Olsen, Sæunn Ó. Hansen, Rodmundur Nielsen, Marja Lamhauge, Hans T. Olsen, Hans J. Lamhauge, Ragnar Olsen, Kári P. Højgaard og Tummas Jacobsen*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

MERKISDAGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað er P/F Klement Petersen í Saltangará, sum hevur latið stívliga 700 fermetra stóra bygningin til Runavíkar kommunu.

Hans Jacob Lamhauge, formaður í teknisku nevnd býráðsins, sigur, at bygningurin í fyrsta lagi fer at hýsa vegadeildini hjá kommununi, vatnmeistaranum, og sum frálíður er ætlanin eisini, at ruskplássið, sum í dag liggur við Fjøruvegin í Runavík, skal flytast inn á Lambareið.

– Nú kommunan yvirtekur bygningin frá Klementi Petersen, er nakað eftir at gera. Vit skulu hava skrivstovur til arbeiðsformannin, vatnmeistaran og leiðaran á ruskplássinum, sigur Hans Jacob.

Arbeiðsformaður hjá kommununi er Bjarni Kjeld, sum loysti Andrew Hentze av á nýggjárinum. Vatnmeistari er Hermann á Líknagøtu, og leiðari á ruskplássinum er Jóannes Johannesen.

## Góðar umstøður

Hans Jacob sigur, at nú klárt er at flyta maskinur og annað hjá kommununi inn í nýggja bygningin á Lambareiði, stendur bygningurin í stívliga tveimum miljónum krónum.

Hann væntar, at umleið ein miljón krónur skulu nýtast aftrat, áðrenn skrivstovur, kaffistova og wc'ir eru komin.

– Hetta verður so tað næsta stigið hjá okkum, sigur hann.

Formaðurin í teknisku nevnd fegnast um bøttu umstøðurnar, sum ikki minst vegadeildin hevur fingið, tí nú ber eisini til at viðlíkahalda maskinurnar undir taki og rúmligum umstøðum.

– Her er høgt til loft og vítt til veggja, og tað verður ein stórur fyrimunur, nú arbeiðsamboð og maskinur, sum í flestu førum hava staðið úti, verða savnaði undir einum og sama taki. Bygningurin fer at hýsa øllum, sum hevur við uttanduraarbeiði at gera, sigur hann.

Bjarn Kjeld, arbeiðsformaður, hevur fleiri mans í arbeiði, og hesir hava hildið til í sonevnda vektarhúsinum hjá Landsverkfrøðinginum á Lambareiði. Vatnmeistarin hevur havt støð við reinsiverkið í Saltangará.

Sum undirleverandørar í samband við byggingina á Lambareiði, hevur P/F Klement Petersen havt Svenn Olsen, timburmeistara og Matthias Davidsen, el-innleggjara.

## Autistar í Lamba

Úr nýggja bygninginum hjá Runavíkar kommunu á Lambareiði bar leiðin beinleiðis oman í gamla skúla í Lamba, sum nú er útbygdur og umvældur fyri stívliga eina miljón krónur.

Tað er Finnur Simonsen, ið bygdi nýggja barnagarðin úti á Mýrunum, sum hevur staðið fyri arbeiðinum at útbyggja og umvæla skúlan í Lamba, har eingin skúlagongd hevur verið síðan seinast í fimtiárunum.

Útgrevstrinum tók Tórfríður Magnussen sær av, og Marni Olsen hevur gjørt málaraarbeiðið.

Skúlin í Lamba er sum nýggjur, nú hann er avhendaður. Har eru tvey stór høli, sum gangandi er ímillum, køkur og wc'ir.

Skúlin hevur verið nýttur til ymiskar aktivitetir í Lamba, eitt nú sunnudagsskúla og nakrar gudstænastur um árið. Aftrat hesum og øðrum tiltøkum, ið hugsandi kundu verið í skúlanum, verður hann nú eisini í fyrsta lagi karmur um trý børn við autismu.

Nú skúlin er útbygdur og umvældur, er rúm fyri mongum ymiskum tiltøkum og aktivitetum, sum hugsandi kunnu haldast í nýggju og snotuligu hølunum.



*Marja Lamhauge, formaður í sosialu nevnd hjá Runavíkar býráði*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Býráðslimirnir, Kári P. Højgaard og Ragnar Olsen*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Svenn Olsen, timburmeistari, Matthias Davidsen, el-innleggjari og Jackie Zachhau, montørur hjá P/F Klement Petersen*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Hans J. Lamhauge er formaður í teknisku nevnd, og Símun Mittún, P/F Klement Petersen*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



# Á brúnni

**14 ára gamli drongurin, ið fyri 25 árum síðan fór við línubáti til Flemish Cap, lærdi disciplin, lærdi at taka ábyrgd og lærdi gott samanhald. Eginleikar, ið hava verið hansara barlast í ítrótti, vinnulívi og politikki. Hann hevur selt bilar og fisk, men nú er hann andlit Sambandsfloksins, ið skal selja boðskapin**



FORMAÐUR
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*jonbrian@sosialurin.fo*

Fríggjakvøldið setti Kaj Leo Johannesen seg í formansstólin í flokkinum, sum hóast størstur í atkvøðutali gjørdist stóri taparin við seinasta val.

39 ára gamli havnarmaðurin, við sterkum røtum til Mykinesar, tók yvir dagin eftir at floksfelagi hansara legði eitt fíggjarlógaruppskot fyri tingið, ið vísir yvir eina fjórðings milliard í undirskoti. Og hann tekur yvir í einum flokki, sum í seinastuni hevur verið raktur av innanhýsis persónsstríði.

Hann skal leiða ein flokk við ikki færri enn tveimum fyrrverandi formonnum millum tinglimirnar, umframt ein sterkan næstformann, ið eitt stutt skifti eisini hevur verið formaður.

Tí hevur Kaj Leo Johannesen frá fyrsta degi gjørt greitt, at hansara uppgáva verður at fáa Sambandsflokkin fram og persónarnir í bakgrundina. Og hann vil rætta eina hond út til samarbeiði, bæði innanfloks og við aðrar flokkar.

## Vil síggja úrslit

Kaj Leo Johannesen umboðar eitt nýtt ættarlið í Sambandsflokkinum. Meðan flokkurin í eygunum á mongum higartil hevur umboðað tað varliga, onkur vildi kanska sagt afturhaldssinnaða, leggur nýggi formaðurin stóran dent á at útstrála ein dynamikk og eina orku, ið skal síggjast aftur í einum offensivum politikki.

– Mín veika síða er kanska, at eg eri bráur, havi ringt tol. Eg vil síggja úrslit, heldur í dag enn í morgin, sigur Kaj Leo Johannesen og sipar til royndirnar úr vinnulívinum.

- Kanska serliga tjóðveldisfólk hava havt eina ímynd av Sambandsflokkinum sum ein defensivan flokk. Men hetta er ikki so. Báðir partar ynskja tað besta fyri Føroyar, men vit eru grundleggjadi ósamd um mátan at gera tað uppá. Tó hava vit nógvar felagsnevnarar, ið vit kunnu brúka í politiska arbeiðinum.

Kaj Leo Johannesen kemur inn á grundvirði Sambandsfloksins, ið er ein framhaldandi ríkisfelagsskapur við Danmark.

– Men hvør hevði fyri 10 árum síðan trúð, at vit fóru at koma við einum nýskipanaruppskoti, har Føroyar verða roknaðar sum partur av einum ríki, ið er samansett av trimum javnbjóðis pørtum. Vit eru í eini tíð við broytingum, vísir Kaj Leo Johannesen á.

## 7 ár er nóg mikið

Í 1979 fór tann tá 14 ára gamli Kaj Leo Johannesen úr skúlanum. Júst liðugur við 7. flokk fór hann við Váðasteini hjá Jóhan í Hoyvík á Flemish Cap, og har var hann í fýra ár.

– Tá metti eg, at sjey ár vóru ivaleysa long tíð at ganga í skúla.

Hóast lítlu skúlagongdina metir hann seg hava fingið eina barlast hesi fýra árini, ið avgjørt er komin honum til góðar seinni. Kaj Leo Johannesen nevnir disciplin, ábyrgd og gott samanhald sum førningin frá hesum árum.

Seinni tók hann skipsføraraútbúgvinig og sigldi síðan úti í tvey ár, fyrst hjá Maersk og seinni við farmaskipinum Herborg hjá Hans Paula Johannesen, áðrenn hann legðist uppi á landi.

Skipsdekkið varð skift út við Toyotabilarnar hjá Reyni Service, ið hann seldi eitt tíðarskeið, til hann í 1989 fekk starv sum sølumaður hjá Fiskasøluni. Har var hann til 1995, tá hann fekk í boði at vera við til at byggja eina søludeild upp á Kósini í Klaksvík.

Í 1997 stovnaði Kaj Leo Johannesen, saman við Róa Egholm, sølufyritøkuna Farex.

– Tað var ein dreymur, ið eg hevði havt síðan tíðuna á Fiskasøluni. At gerast mín egni harri, greiðir Kaj Leo Johannesen frá.

Hann starvast enn á Farex, men tó eru tímarnir har fækkaðir, samtíðis sum politiska uppgávan er vaksin.

## Ja til Evropa

Politiska leiðin hjá Kaj Leo Johannesen byrjaði í 1988. At tað júst gjørdist Sambandsflokkurin komst ikki av støðu floksins til ríkisfelagsskapin, men heldur støðan til Evropa og ES.

– Tá føldi eg, at Sambandsflokkurin var hin einasti, ið segði ja til Evropa og ES. Hin einasti, ið tordi at tosa um globaliseringina, og tað neyðuga at fáa okkara vinnulív nærri restina av heiminum. Og tað var hetta, ið fekk meg at lima meg inn í flokkin, sigur Kaj Leo Johannesen og heldur fram:

– Í dag er støðan at kalla hin sama, burtur sæð frá at vit eru enn størri eftirbátur. Vit lata alsamt størri part av okkara ráվøru óvirkaða til ES, og tað er ein trupulleiki, ið vit mugu gera nakað við.

## Familjan

Kaj Leo Johannesen er giftur við Jórun, og saman eiga tey synirnar Heina, sum er fýra, og Jákup, ið er tvey ár.

Men hvat sigur familjan til hansara politisku ambitiónir, ið nú hava leitt hann upp á ovastu rók í Sambandsflokkinum?

– Tað hevur havt stóran týdning fyri meg, at familjan hevur bakkað meg upp, eitt hundrað prosent.

Síðan Lisbeth L. Petersen fór frá sum forkvinna í flokkinum, hevur Kaj Leo Johannesen vitað, at ein formanssessur kundi koma uppá tal. Og konan hevur vitað, hvat hann hevur viljað.

Kaj Leo Johannesen greiðir frá, at hann hoyrir til tað nýggja ættarliðið, ið hóast eitt krevjandi starv setir prís uppá at vera saman við familjuni,

– Í síðsta enda gevur tað tær nakað við aftur til arbeiðis.

Hann heldur tað vera av alstórum týdningi at duga at sleppa trupulleikunum, eisini mentalt, áðrenn ein fer til hús eftir loknan arbeiðsdag. Hann trýr uppá, at tað ber til, eisini sum ein politiskur leiðari.

– Tað er ein spurningur um at leggja til rættis, sigur hann sannførandi.

## Manglandi royndir

Kaj Leo Johannesen er ikki seinur at viðganga, at hansara politisku royndir eru avmarkaðar. Hann sat á tingi í ein mánað í 1996 sum varamaður, men varð annars fyrstu ferð valdur á løgting í 2002. Harumframt sat hann í býráðnum í Havn frá 1996 til 2000.

Men sum ein góður sølumaður skal gera, so vendir hann eisini hetta til nakað positivt:

– Tað kann eisini vera ein styrki. Tað ger, at eg kanska hugsi ótraditionelt fyri at finna loysnir.

Kaj Leo Johannesen vísir á sínar royndir úr vinnulívinum og eisini ítróttinum, har hann millum annað spældi 300 dystir við 1. deild hjá HB, umframt at hann í fleiri ár var partur av landsliðshópinum.

– Her havi eg fingið nakrar eginleikar, ið hava við menniskju at gera. Eina vinnaramentan!

Men Kaj Leo Johannesen ásannar samtíðis, at hann hevur nógv at læra, og hann ætlar sær eisini at lurta eftir eldru og meira royndu kreftunum í flokkinum.

– Eg komi nokk altíð at gera feilir ella skeivar dispositiónir. Mín lívsáskoðan er, at tú við hvørt mást tora at taka kjansin, mást tora at gera feilir. Tí tað er partur av framdriftini. Men týdningarmiklast er tá, at tú torir at viðganga tær skeivu dispositiónirnar, ið tú gert, og vera til reiðar at rætta tær.

Kaj Leo Johannesen sigur seg dáma væl at vera offensivan, enntá "bombastiskan" viðhvørt, fyri at selja boðskapin. Men samtíðis er hann greiður yvir, at nú hann gerst formaður, fangar borðið í størri mun.

## Støðufesti

Kaj Leo Johannesen leggur stóran dent á at skapa eitt støðufesti, ein stabilitet, í Sambandsflokkinum. Og tí er hann eisini til reiðar at sita í formanssessinum í eitt longri tíðarskeið, um umstøðurnar eru til tess.

– Men tað er sjálvandi treytað av, at eg klári at liva upp til hesa ábyrgd. At eg klári at lyfta flokkin. Klári eg tað, so fái eg eisini nøkur góð og lærurík ár, sigur hann sannførandi.

### Fakta

**Politiska leiðin:**

- **1988:** Limur í Sambandsflokkinum
- **1994:** Fyrstu ferð uppstillaður til løgtingið
- **1996:** Valdur í býráðið í Havn, stillaði eisini upp til fólkatingsvalið
- **2001:** Nummar fimm á Sambandslistanum til fólkatingsvalið
- **2002:** Valdur á løgting við 263 atkvøðum
- **2004:** Afturvaldur við 551 persónligum atkvøðum, formaður í Sambandsflokkinum